# 50 børn fáa betri sømdir í skúlanum

**Ein arbeiðsbólkur hevur handað løgmanni eitt álit um, hvussu øll skúlabørn fáa nøktandi lærulíkindi**

SKÚLAMÁL
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Í álitinum verður sagt, at tað snýr seg um, at skúlin skipar fyri eykatiltøkum, ið eru neyðug fyri at skapa øllum børnum lærulíkindi. Arbeiðsbólkurin metir, at slík tiltøk kunnu verða um 50 børnum at gagni.

Bólkurin peikar á fleiri ítøkilig átøk, harav tað týdningarmesta er at seta av tann pening, sum skal til. Tilmælini í álitinum eru hesi:

- at uppgávan og ábyrgdin fyri at veita skúlabørnum persónligan stuðul skal liggja hjá landsstýrismanninum í mentamálum,
- stýrt eigur at verða eftir meginregluni um sektorábyrgd,
- játtanin til sernámsfrøðiligt virksemi í fólkaskúlanum skal hækkast við 6,35 mió. kr.,
- Mentamálaráðið skal gera kunngerð um sernámsfrøði í fólkaskúlanum, ið útgreinar, at skúlin veitir persónligan stuðul til skúlabørn,
- kærunevnd, sum skal viðgerða kærur innan sernámsfrøðiliga virksemi í skúlum, skal setast á stovn,
- setanarviðurskiftini hjá stuðlum í fólkaskúlanum skulu betrast,
- samstarvsnevnd at samskipa tilboð til børn við serligum tørvi verður sett á stovn.

# Álit um giktasjúklingar handað

**Í áliti um giktasjúklingar verður millum annað mælt til, at seta giktaskúlar á stovn, og at styrkja um reumatologisku tænanstuna**

HEILSUMÁL
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Mikudagin fekk Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í almanna- og heilsumálum handað álit um, hvussu viðgerðin hjá giktasjúkum kunnu betrast í framtíðini.

Í Føroyum eru eingi hagtøl yvir, hvussu nógvir giktasjúkingar eru, men arbeiðsbólkurin metir, at umleið 7.500 føroyingar hava giktasjúku, harav umleið 500 liðagikt.

Arbeiðsbólkurin metir als ikki, at viðgerðin hjá giktasjúklingum eru nóg góð í Føroyum. Eitt nú er eingin serlækni í giktasjúkum (reumatologur) í Føroyum, men ein konsulentskipan er á Landssjúkrahúsinum. Tí mælir bólkurin millum annað til, at søkt verður eftir einum reumatologi til føroyska sjúkrahúsverkið, og um hetta ikki eydnast verður mælt til, at konsulentskipanin verður útbygd.

Millum tey 7 tilmælini um at betra viðgerðarviðurskiftini verður eisini mælt til, at rehabiliteringsmøguleikarnir eiga at betrast, við at giktaskúlar verða settir á stovn á øllum 3 sjúkrahúsunum. Á einum giktaskúla lærir sjuklingurin um sjúkuna, og hvussu ein skal liva við henni. Meginreglan er hjálp til sjálvhjálp. Royndir úr aðrastaðni vísa, at sjúklingurin fær eitt betri lív, um hann fær vitan um sjúkuna og tekur ábyrgd av sjúkuni.

## Amnesty fegnast

Amnesty International fegnast um, at Tingið samtyktið at skoyta "kynsligan samleika" uppí 266b.

Amnesty International Føroya deild sigur í tíðindaskrivi, at felagið fegnast um avgerðina hjá Føroya løgtingi um at víðka mannamunsgreinina soleiðis, at hon eisini fevnir um "kynsligan samleika".

– Avgerðin í dag er eitt stig á leiðini at skapa størri tolsemi mótvegis samkyndum í Føroyum og sendir somuleiðis greið og ivaleys boð um, at mismunur ikki verður góðtikin í Føroyum, sigur felagið.

**rd.**

# Greiður meiriluti fyri Føroyar sum eitt valdømi

VELJARAKANNING
*Jógvan Mørkøre*

Týsdagin í seinastu viku fall uppskot til samtyktar í løgtinginum, at Føroyar skuldu skipast sum eitt valdømi. 11 atkvøddu fyri, 18 ímóti og 1 blankt.

Júst samstundis varð veljarakanning gjørd, har veljarar fingu høvi at siga sína støðu til sama spurning. Úrslitið gjørdist tað øvugta av tí í tingsalinum. Ein góð helvt var fyri, ein triðingur ímóti og ein tíggjundapartur var ivasamur.




### Meginøkið fyri

Sum væntað, so var ein ruddiligur meiriluti fyri í Suðurstreymoy. Meir enn tveir triðingar tóku undir. Knappur fjórðingur var ímóti. Í Norðurstreymoy og Eysturoy var somuleiðis dyggur stuðul fyri hesum; í báðum støðum var góð helvt fyri og umleið ein triðingur ímóti. Ein tepur meiriluti tykist eisini at vera fyri í Suðuroy.

Í Vágunum og Sandoy eru veljarar ímóti. Úr góðari helvt og tættandi í tveir triðingar. Tey, ið eru fyri liggja um triðingin. Í Norðoyggjum er ein tepur meiriluti somuleiðis ímóti.

### Eingin munur á kvinnum og monnum

Róð hevur verið framundir, at eitt valdømi hevði tryggjað frægari kvinnuluttøku á løgtingi. Tískil kundi væntast, at kvinnur sum heild tóku betur undir við hesum uppskoti enn menn. So er ikki. Her eru tølini rættuliga líka. 55 % av monnunum taka undir, meðan 53 % av kvinnunum siga ja.

